VÁGA KOMMUNA

# Gerðabók

# Býráðið

**Dagfesting:** 19.04.2022 kl. 18:30
**Fundarstaður:** Býráðsskrivstovan
**Málnr.:** 21/00003

Til staðar: Bjarni Prior, Albert Ellefsen, Dagbjørn Hansen, Rósa Samuelsen, Jónhard Selfoss, Tórdis Dam Johannesen, Ásla Leila Johansen, Sólfríð Fjallsbak, Jóanis Albert Nielsen, Herborg Gaardlykke

Varalimir:

Ikki til staðar: Jens Gaardlykke

Aðrir partar:

Fundarskrivari: Jóhan Hendrik Ellefsen



| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Kunning** | | | |
| 5/22 | 22/00039-4 | Mál beind í nevnd 4/22 | 3 |
| **Til støðutakan** | | | |
| 18/22 | 22/00115-13 | Útbjóðing av útstykkingarætlan á matr. nr. 133k í Sandavági | 4 |
| 19/22 | 22/00181-3 | Umsókn um byggiloyvi frá Snarfrost | 6 |
| 20/22 | 22/00185-3 | Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 219g í Sandavági til ummælis | 7 |
| 21/22 | 21/00152-20 | Umsókn um at umbyggja neyst, matr. nr. 249e í Miðvági | 8 |
| 22/22 | 22/00183-4 | Áheitan á kommununa um at yvirtakað atkomuvegin, sum er frá Húsanesvegi til stykkini 167d, c og b | 9 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 23/22 | 22/00080-3 | Jens Gaardlykke, býráðslimur, skjýtur upp at gera eina reglugerð fyri bátahylin | 10 |
| 24/22 | 21/00799-6 | Støðutakan um intranet til stovnarnar | 11 |
| 25/22 | 22/00089-5 | Tilboð frá TRYGD til starvsfólk uppá "Tanntrygd" og "Viðgerðartrygd" | 12 |
| 26/22 | 22/00127-2 | Umsókn um stuðul til Samkirkjudagar 2022 | 13 |
| 27/22 | 22/00162-2 | Umsókn um fíggjarligan stuðul | 14 |
| 28/22 | 22/00148-5 | 2. viðgerð av eykaætlan EXTRA22_01 | 15 |
| | | | |

Formansváttan:______________

VÁGA KOMMUNA

**Kunning**

## 5/22 Mál beind í nevnd 4/22

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 19.04.2022 | 5/22 |

**Málslýsing:**

**Býráðið 19. april 2022:**

Formansváttan:

VÁGA KOMMUNA

**Til støðutakan**

# 18/22 Útbjóðing av útstykkingarætlan á matr. nr. 133k í Sandavági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.04.2022 | 20/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 29/22 |
| 3 Býráðið | 19.04.2022 | 18/22 |

**Málslýsing:**

Eftir at arbeiðið at gera útstykkingina á matr.nr. 133k í Sandavági var boðið út millum 6 arbeiðastakarar. Licitatión var 17 mars, og inn komu fýra tilboð.

Úrslitið av lisitatiónini var:

| | |
|---|---|
| Deskon | Kr. 9.459.525,73 |
| Trøðhamar | Kr. 8.984.998,24 |
| JMB Andreasen (Eggaba) | Kr. 8072.666,00 |
| Sp/f Maskingrevstur | Kr. 6.700.550,00 |

Allir prísir eru uttan mvg.

Tekniska umsiting hevur, saman við borgarstjóra og ráðgevum havt fund við Allan H. Hansen, har tosað var um hvussu hann hevði hugsa sær at gjøgnumført arbeiðið um hann fekk møguleikan.

Allan greiddi frá, at hann hevði gjørt avtalur við tveir aðrar arbeiðstakarar, um at hjálpa honum við arbeiðinum. Eisini hevði hann tosað við eitt felag, sum arbeiðir við uppmáting og avseting um at gera hetta arbeiðið fyri seg.

Viðmerkingar frá umsitingini:

Umsitingin saman við borgarstjóranum mælir til at taka av lægsta tilboðnum frá Maskingrevstur.

Formansváttan:__________

**Tekniska nevnd 07. april 2022:**

Viðmælt at takað av tilboðnum hjá Sp/f Maskingrevstur.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

Viðmælt at taka undir við Teknisku nevnd.

**Býráðið 19. april 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 19/22 Umsókn um byggiloyvi frá Snarfrost

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 07.04.2022 | 5/22 |
| 2 Býráðið | 19.04.2022 | 19/22 |

## Málslýsing:

Snarfrost søkir um byggiloyvi til til byggistig 1, 2 og 3. Í umsóknini verður Vága kommuna biðin um at síggja burtur frá byggistigi 4, sí annars viðløgdu umsókn við tekningum.

## Viðmerkingar frá umsitingini:

Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt umsóknina og hevur hesar viðmerkingar:

1. Núverandi bygningur stendur 13,10 m frá bryggjukanti, og um loyvi verður givið at byggja tað Snarfrost søkir um, verður bygningurin 7,00 m frá bryggjukanti.
   Almenna byggisamtyktin fyri Vága kommunu ásetur:
   4. Bygging til vinnuendamál má ikki verða sett nærri bryggjutrom enn 20 m.

2. Um loyvi verður givið til byggingina, eigur hetta at verða treytað av at brunaprosjekt, ið lýkur øll krøv sambært lóggávuni, verður sent kommununi áðrenn byggiloyvi verður útskrivað. Eisini eigur tað at verða ein treyt at bygningurin verður sýndur og góðkendur áðrenn hann verður tikin í nýtslu.

## Vinnu- og havnanevndin 07. apríl 2022:

Viðmælt at geva byggiloyvi treytað av at brunaprosjekt fyriliggur, og at bygningurin verður sýndur og góðkendur áðrenn hann verður tikin í nýtslu.

## Býráðið 19. apríl 2022:

Einmælt samtykt at taka undir við vinnu- og havnanevndini.

Formansváttan: ______________

# 20/22 Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 219g í Sandavági til ummælis

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.04.2022 | 25/22 |
| 2 Býráðið | 19.04.2022 | 20/22 |

## Málslýsing:

Umhvørvisstovan hevur sent umsókn um sundurbýti av matr. nr. 219g í Sandavági til ummælis.

Talan er um ein matrikul, ið verður býttur sundur í tvey, til tvíhús.

## Tekniska nevnd 07. april 2022:

Viðmælt.

## Býráðið 19. april 2022:

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

# 21/22 Umsókn um at umbyggja neyst, matr. nr. 249e í Miðvági

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.04.2022 | 26/22 |
| 2 Býráðið | 19.04.2022 | 21/22 |

**Málslýsing:**

Eigarin av matr. nr. 249e í Miðvági søkir um byggiloyvi til nýtt neyst. Eisini er ætlanin at byggja nakað yvir á matr. nr. 233d, sum umsøkjari leigar frá Vága kommunu.

Umsitingin hevur byggimálsviðgjørt umsóknina, og lýkur hon øll krøv í serstøku byggisamtyktini . Tað einasta, ið ikki er innanfyri krøvini í byggisamtyktini eru tvær altanir á sunnaru síðu, ið hanga útum matrikulin. Nevndin má takað støðu til um loyvi skal gevast til frávik hesum viðvíkjandi, og um so er um umsøkjarin skal leiga undilendi undir altanunum.

**Tekniska nevnd 07. april 2022:**

Viðmælt at geva byggiloyvi, tó verður frámælt at geva loyvi at gera altanir út um matrikulin.
Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerðini av hesum málið.

**Býráðið 19. april 2022:**

Sólfríð Fjallsbak luttók ikki í viðgerini av málinum.

Einmælt samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Formansváttan:____________

## 22/22 Áheitan á kommununa um at yvirtakað atkomuvegin, sum er frá Húsanesvegi til stykkini 167d, c og b

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 07.04.2022 | 23/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 26/22 |
| 3 Býráðið | 19.04.2022 | 22/22 |

**Málslýsing:**

Eigararnir av matr. nr. 167d í Miðvági bjóða Vága kommunu, uttan kostnað, at yvirtakað vegin, sum er frá Húsanesvegi til matr. nr. 167d, c og b.

Vegurin er í ringum standi, og um kommunan yvirtekur vegin mugu ábøtur gerast á hann.

Ein eldri borgari býr í húsunum, vegurin gongur til, og í dag er støðan tann at bilurin hjá IRF noktar at heinta rusk, tí vegurin er í so ringum standi. Eisini verður hetta ein trupuleiki, um borgarin fær brúk fyri hjálp í heiminum, tí atkomuviðurskiftini eru so vánalig.

**Tekniska nevnd 07. april 2022:**

Viðmælt at yvirtakað vegin.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

Viðmælt at taka undir við Teknisku nevnd.

**Býráðið 19. april 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan: ____________

VÁGA KOMMUNA

**23/22 Jens Gaardlykke, býráðslimur, skjýtur upp at gera eina reglugerð fyri bátahylin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 10.03.2022 | 3/22 |
| 2 Býráðið | 22.03.2022 | 15/22 |
| 3 Vinnu- og havnanevndin | 07.04.2022 | 4/22 |
| 4 Býráðið | 19.04.2022 | 23/22 |

**Málslýsing:**

Jens Gaardlykke skjýtur upp at gera reglugerð fyri bátahylarnar hjá Vága kommunu.

Umsitingin hevur gjørt eitt uppskot til reglugerð, uppskotið er viðheft, og verður nevndin biðin um at takað støðu til uppskotið.

**Nýggjar upplýsingar til fundin 07.04.2022:**

Av tí at broytingarnar, ið vóru gjørdar í uppskotinum til reglugerð á fundinum 22. Mars 2022 ikki komu við, orsakað av tøkniligum trupulleikum, verður nevndin biðin um at viðgera málið av nýggjum.

**Vinnu- og havnanevndin 10. marts 2022:**

Viðmælt sum broytt á fundi í Vinnu- og havnanevndini 10.03.2022

**Býráðið 22. marts 2022:**

Málið verður tikið av skrá.

**Vinnu- og havnanevndin 07. april 2022:**

Viðmælt sum broytt á fundi í Vinnu og havnanevndini 10.03.2022

**Býráðið 19. april 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við vinnu- og havnanevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

## 24/22 Støðutakan um intranet til stovnarnar

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 04.04.2022 | 23/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 28/22 |
| 3 Býráðið | 19.04.2022 | 24/22 |

**Málslýsing:**

Málið um tilboð frá Intra var fyri á býráðsfundi 21. desember 2021, og bleiv beint aftur í Mentanar- og trivnaðarnevndina.

Nýtt í málinum 30. mars 2022:
Samanbera kostnað

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 04. april 2022:**

Mælt verður til at taka undir við tilboðnum frá Intra.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 19. april 2022:**

Meirilutin samtykkir at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Minnilutin, sum er Dagbjørn Hansen og Jóanis Albert Nielsen, taka ikki undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

VÁGA KOMMUNA

## 25/22 Tilboð frá TRYGD til starvsfólk uppá "Tanntrygd" og "Viðgerðartrygd"

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 19/22 |
| 2 Býráðið | 19.04.2022 | 25/22 |

**Málslýsing:**

Tryggingarfelagið TRYGD bjóðar bólkatryggingar til starvsfólk hjá kommununi. Starvsfólk skulu sjálvi gjalda fyri tryggingarnar.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

**Býráðið 19. april 2022:**

Samtykt at taka málið av skrá og beina tað aftur í fíggjarnevndina.

Formansváttan:________________

VÁGA KOMMUNA

## 26/22 Umsókn um stuðul til Samkirkjudagar 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 07.03.2022 | 12/22 |
| 2 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 04.04.2022 | 32/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 22/22 |
| 4 Býráðið | 19.04.2022 | 26/22 |

**Málslýsing:**

Vága prestagjald søkir um stuðul til festivalin Samkirkjudagar sum er eitt felags kristiligt átak, sum varpar ljós á kristindómin í landinum, við tónleiki, fyrilestrum, framsýningum v.m.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 07. marts 2022:**

Heitt verður á umsitingina um at fáa til vega eina fíggjarætlan og taka málið aftur á skrá á næsta fundi.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 04. april 2022:**

Mælt verður til at stuðla við kr. 62.000,- umframt hølir hjá kommununi verða latin ókeypis.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 19. april 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:__________

VÁGA KOMMUNA

## 27/22 Umsókn um fíggjarligan stuðul

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentunar- og trivnaðarnevndin | 04.04.2022 | 26/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 23/22 |
| 3 Býráðið | 19.04.2022 | 27/22 |

**Málslýsing:**

Krígssavnið søkir um fíggjarligan stuðul til liðugtger av útbygging av SO bygninginum.

**Mentunar- og trivnaðarnevndin 04. april 2022:**

Sum fíggjarstøðan hjá kommununi er í løtuni, verður mælt til ikki at ganga umsóknini á møti, men at hildið verður fram við árliga stuðlinum.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

Viðmælt at taka undir við Mentunar- og trivnaðarnevndini.

**Býráðið 19. april 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við mentanar- og trivnaðarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

# 28/22 2. viðgerð av eykaætlan EXTRA22_01

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.04.2022 | 18/22 |
| 2 Býráðið | 19.04.2022 | 28/22 |

**Málslýsing:**

**Fíggjarnevndin 16. marts 2022:**

Viðmælt.

**Býráðið 22. marts 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 13. april 2022:**

Viðmælt.

**Býráðið 19. april 2022:**

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini.

Formansváttan:____________

VÁGA KOMMUNA

Fundurin lokin kl. 19:38

Bjarni Prior

Albert Ellefsen

Dagbjørn Hansen

Rósa Samuelsen

Jónhard Selfoss

Tórdis Dam Johannesen

Ásla Leila Johansen

Sólfríð Fjallsbak

Jóanis Albert Nielsen

Herborg Gaardlykke

Formansváttan: